# BMW Sportvan – Sports Activity Coupé



*Konseptbilurin BMW Sportvan, sum kemur á marknaðinum eini tvey ár. Leggið til merkis at bakhurðarnar eru hongdar í afturkant*

**Um eini tvey ár kemur ein heilt nýggjur og annarleiðis BMW á marknaðin. Talan verður um Sportvan, ið er ein sokallaður Sports Activity Coupé (SAC), sum verður eitt millum ting millum ein stationcar og ein MPV**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

BMW Sportvan, sum í fyrsta lagi kemur á marknaðin í 2007, verður gjørdur sum eitt mótspæl til Mercedes R-klassan, ið er eitt millumting millum ein stationcar og ein MPV.

BMW kalla konseptið SAC (Spots Activity Coupé). Bilurin verður helst bygdur yvir tann næsta BMW X5. Verkfrøðingar og designarar hjá BMW siga, at hesin bilurin verður heilt annarleiðis enn allir aðrir BMW, og teir gera alt fyri, at tyngdipunktið skal vera so lágt sum til ber fyri at fáa so góðar koyrieginleikar sum gjørligt. Takið á bilinum verður bæði sterkt og lætt - gjørt úr kolfiburtilfari.

Sum tað sæst á myndini, eru bakhurðarnar hongdar í afturkant, eins og á Rolls Royce sum eisini hoyra til BMW.

Bensinmotorarnir verða eftir ætlan 3.0, 4.0 og 4.8 litrar og minst tveir 3.0 litur turbo dieselmotorar. Møguliga verður eisini onkur útgáva við 507 hk frá BMW M5 og M6.

Sportvan kemur í fyrsta lagi á marknaðin í 2007.

# Toyota størsti partaeigari í Subaru







*Toyota hava keypt meirilutan av partabrøvunum í Subaru. Hvørjar ætlanir Toyota hava vi? Subaru er ikki heilt greitt*

**Eftir at Toyota hava keypt meirilutan í japansku Subaru verksmiðjuni, Fuji Heavy Industries Ltd, frá General Motors, fer samstarvið millum GM og Subaru helst at halda uppat**

BILAR
*Magus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

General Motors hava selt ein stóran part av partabrøvunum í Subaru bilverksmiðjuni Fuji Heavy Industries Ltd til Toyota, sum nú eigur meirilutan í Subaru. Hetta hevur við sær at nýggi samstarvsfelagin hjá Subaru verður Toyota, og samstarvið við GM helst fer at halda uppat.

GM eigur svensku Saab verksmiðjuna, og í m.a. USA eru fleiri av Saabmodellunum Subaru bilar við Saab búmerkjum, sum t.d. Saab 9-2, sum er ein Subaru Impreza.

Toyota hava ætlanir um at keypa enn fleiri partabrøv í Subaru á fría marknaðinum.

Hvørjar ætlanir Toyota hava við Subaru er ikki heilt greitt.



*Subaru Impreza verður eisini gjørdur sum Saab 9-2*